

Eldar Sætre, forstjóri í Statoil. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Statoil fær altjóða viðurkenning fyri at ganga á odda fyri nýggjum orkukeldum

**Jógvan Hugo Gardar**

08.07.2015 - 15:10

Oljan.fo

Fyri løtu síðani almannakunngjørdi felagsskapurin Energy Intelligence í New York at norska oljufelagiðStatoil fær viðurkenning fyri sítt arbeiði við at finna nýggjar orkukeldur, og fyri sítt arbeiði við at finna orkukeldur sum geva minni útlát. Heiðurlønin kallast 2015 Energy Intelligence Award for Leadership in New Energy.

Statoil fær viðurkenning fyri at vera undangongufyritøka í samband við at heimurin hevur brúk fyri nýggjum varandi orkukeldum. Energy Intelligence vísir á at Statoil hevur víst politiskan vilja, hevur gjørt íløgur í aðrar orkukeldur, og arbeiðir við at gera sítt olju- og

gassvirksemi grønari. Víst verður á at Statoil millum leiðandi orkufeløg í heiminum verður mett at verða ein fyritøka sum vísir vilja til at ganga á odda.

Viðurkenningin verður handa Statoil á olju- og búskaparráðstevnuni sum verður í London i oktober.

Forstjórin í Statoil, Eldar Sætre, hevur fyri stuttum sagt at veðurlagsbroytingarnar saman við høgum kostnaði er tað sum krevur mest av oljuídnaðinum í dag. Hann legði afturat at Statoil ynskir at gerast meir karboneffektivt.

Statoil hevur eisini víst á at fyritøkan metir at kappingarevni og lægri útlát hanga saman, og eru avgerandi fyri um ídnaðurin megnar at vera kappingarførur í framtíðini.

Statoil hevur millum annað gjørt íløgur í vindorkulundir á havinum, og umhugsar hvussu fleiri íløgur kunnu gerast á økinum.

Dong Energy fekk heiðurin Energy Intelligence Award for Leadership in New Energy í 2014, meðan spanska fyritøkan Iberdrola fekk hann í 2013.